# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tað var nú óluksáligt, at mann ikki stillaði upp til kommunuvalið*

*Egil á Bø, EB/Streymur*

# Nærum 1.000 fólk í FM-veitslu

**Talan verður um rimmar FM-gildið í Ítróttarhøllini á Eiði. Sølan av atgongumerkjum er steðgað, tí vónleyst er at kroysta fleiri inn í høllina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Eftir FM-sigurin á Skála kom proppur í á Shell-støðini við streymin, har fólk í stríðum streymi vildu vissa sær atgongd til rimma FM-gildið*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Tað verður bókstaviliga ársins gildi á Eiði leygardagin. Í mun til ætlaðu gull-veitsluna fyri tveimum árum síðani, so er bjørnin skotin hesaferð, og so er einki at siga til, at nógv vilja vera partur av flettingini, sum verður leygarkvøldið.

Ársveitslurnar hjá EB/Streymi hava verið stórar seinnu árini, men eftir sigurin á Skála týskvøldið ber veruliga av.

- Vit dekka upp í løtuni, og tað verður so til eitt borðhald fyri 850 fólkum, segði Jan Djurhuus, sum er partur av veitslunevndini, tá vit tosaðu við hann hóskvøldið.

- Vit høvdu uttan iva kunnað selt fleiri atgongumerki, men trupulleikin, er at vit fáa ikki meira fólk inn her. Matur skal eisini bíleggjast, og fyrr ella seinni má kokkurin vita, hvussu nógv vit verða, tí tað er jú ikki bara at siga tað, tá so nógv fólk koma í veitslu. Eg sigi ikki, at noyðist onkur línubátur at bróta túr av leygardagin, so finna nokk pláss fyri manningini, men stórt meira enn tí sama fáa vit ikki víðkað gildið, sigur Jan.

Jan Djurhuus er sjálvur hósvíkingur, og har hava tey verið í bygdarhúsinum eftir borðum, stólum og øðrum við. Og somuleiðis hava tey verið í Kollafirði, har veitslan var í fjør, og har hon eisini verður komandi ár, nú skift verður millum báðar hallirnar í økinum, sum EB/Streymur fevnir um.

- Síðani týskvøldið hava fólk teknað seg í stríðum streymi. Millum annað hava vit selt atgongumerki á Shell-støðini, og har kom veruligur proppur í, tá øll ferðslan kom aftur av Skála.

Eitt skifti máttu tey krevja av fólki, at tey høvdu akkurát fyri, tí eingir vekslipengar vóru eftir heldur, sigur Jan, sum sjálvandi gleðir seg saman við restini av veitslufyrireikarunum og –luttakarunum.

## Kvart tons av kjøti

Petur Jacobsen er kokkurin, sum skal gera mat til gestirnar, og tað er ikki hissini innkeyp, sum hann hevur gjørt. Longu í morgun byrjar hann at rigga til, og millum annað fevndi innkeypið um:

Tilfar til 850 rækjubland
Yvir 200 lambstjógv (260-270 kg)
240 kg av eplum
150 litrar av sós
Omaná verður kakuborð

# EB/Streymur fær lagaliga mótstøðu

**EB/Streymur hevur góðan møguleika at spæla seg víðari í Champions League, og bæði B36 og NSÍ ella Víkingur sleppa saman við HB til UEFA Europa League**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kappingarnar verða eitt sindur broyttar í mun til inniverandi kappingar, við tað at InterToto Cup kappingin nú er niðurløgd. Ístaðin verður Evropa Cup kappingin broytt soleiðis, at hon eisini gerst til eina evropeiska liga-kapping undir heitinum UEFA Europa League.

Sambært heimasíðuni hjá FSF fáa Føroyar trý lið við í undankappingina til Europa League 2009/10. HB og NSÍ/Víkingur koma við í fyrsta undankappingarumfar, umvegis avrik síni í Formula-deildini. B36 kemur við í annað undankappingarumfar sum steypavinnari, hóast teir taptu finaludystin móti EB/Streymi.

Ivi hevur annars verið um júst hetta plássið, og í UEFA hevur verið upp á tal, at møguleikin hjá einum tapandi steypafinalisti skuldi strikast heilt.

Eisini Champions League er broytt eitt sindur í mun til undanfarin ár, millum annað verða undankappingardystirnir spældir nakað fyrr enn higartil. Føroyska meistaraliðið kemur í kappingina í fyrsta undanumfari. Men í mun til undanfarin ár, sær út til at rættiliga stórur stórur møguleiki er hjá EB/Streymi at koma víðari til annað undanumfar, tí tað einans eru seks lond í fyrsta undanumfarinum. Umframt Føroyar, er talan um meistaraliðini úr Luksemburg, Malta, Montenegro, Andorra og San Marino.